# Arbeiðsbólkur kanna umhvørvið



*Arbeiðsbólkurin hevur sín fyrsta fund við landsstýrismannin í umhvørvismálum*

JAN MÜLLER

Fyrst í hesi vikuni hevði Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum sín fyrsta fund við ein arbeiðsbólk, sum hann setti herfyri at gera eina lýsing av umhvørvisøkinum, lóggávu, fyrisiting, herundir býti millum land og kommunu, lýsa tørvin á broytingum o.s.fr. Frágreiðingin hjá arbeiðsbólkinum er ætlað at geva eitt yvirlit yvir umhvørvis- og náttúrumál, men ikki at gera uppskot um ítøkiligar lógarbroytingar, tí ætlanin er at bíða við hesum til frágreiðingin hjá arbeiðsbólkinum hevur verið grundarlag undir einum orðaskifti um umhvørvismál á løgtingi komandi vár. Eftir eitt slíkt orðaskifti verður farið undir at gera ítøkiligar broytingar í umhvørvislóggávuni.

Formaður í arbeiðsbólkinum er Jákup Pauli Joensen. Hini eru Dorethe Block, umboðandi Yvirfriðingarnevndina, Jógvan Mørkøre úr Kommunufelagnum, Poul Andreas Joensen umboðandi Kommunusamskipanina og Kate Sanderson, umboð fyri landsstýrið. Skrivari er Rókur Tummasarson. Bólkurin skal verða liðugur við arbeiði sítt tíðliga næsta ár.

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni herfyri vísti Eyðun Elttør, landsstýrismaður eisini á, at tað innan umhvørvismálini nú er skjøtil settur á eina endurskoðan av umhvørvislóggávuni, soleiðis at sleppast kann undan umskaringum millum umhvørvis- og náttúrulóggávu. Somuleiðis er ætlanin at tryggja, at umhvørvislóggávan í minsta lagi livir upp til altjóða skyldur og sáttmálar, sum løgtingið longu hevur góðtikið at galda fyri Føroyar.

Samstundis sum lunnar verða lagdir undir arbeiðið at dagføra lóggávuna á umhvørvisverndarøkinum, verður arbeitt við at menna okkara umhvørvisfyrisiting. Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hevur verið ógvuliga strongd í mong ár og í veruleikanum hevur nøktandi arbeiðsorka ongantíð verið tøk til at umsita løgtingslógina um umhvørvisvernd frá 1988. Hetta hevur ført til eina støðu, har nógvar fyritøkur, sum eiga at verða umhvørvisgóðkendar onga slíka góðkenning hava og mestsum eingin orka er til eftirlit við teimum fyritøkum, sum hava fingið slíka góðkenning vísti landsstýrismaðurin á.

### Skulu hava grundleggjandi vitan

Í sambandi við komandi oljuvinnu segði hann, at tað verður stórur dentur lagdur á, at hetta virksemið kann gerast á ein so tryggan og umhvørvisvinarligan hátt sum gjørligt. Dentur verður lagdur á, at oljufeløg, ið søkja um leitingarloyvi, hava grundleggjandi vitan um umhvørvið í økinum, har ætlanin er at fara undir leitiboringar og at tey geva nøktandi metingar av, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri umhvørvið. Tá mett verður um umsøkjararnar verður eisini tryggjað, at boringar fara fram eftir eini vælvirkandi innaneftirlitsskipan. — Her kann eg leggja afturat, at umboðini fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum saman við Oljumálastýrinum hava gjøgnumgingið umsóknirnar frá oljufeløgum, eru væl nøgd við umhvørvisskipanirnar, sum flestu umsøkjararnir hava. Sjálvandi verður eisini á hesum økinum neyðugt at tryggja eina munadygga umhvørvisfyrisiting, ið hevur førleikan at taka skynsamar avgerðir, skipa umhvørviseftirlitið o.s.fr. segði Eyðun Elttør m.a.

*Anfinn Kallsberg, løgmaður:*

# Oljan ikki lykilin men psykologiskan týdning fyri fullveldi




JAN MÜLLER

- Vit eru samdir um politiskt, at møguligar oljuinntøkur skulu hava so lítla ávirkan sum yvirhøvur gjørligt á samfelagið, tí havi eg ilt við at góðtaka úttalilsi um, at oljan nú skal vera lykilin til føroyskt fullveldi sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í eini viðmerking til úttalilsi, sum hava verið frammi av slíkum slag.

Nú um dagarnar hevði heimskenda sjónvarpsrásin BBC World stutta sending um føroysku sjálvsstýrisætlaninar og har var m.a. nevnt, at nú danir bara góðtaka eina stutta skiftistíð, so verður oljan tað, sum kann loysa upp fyri fullveldinum.

Hinvegin heldur løgmaður, at man kanska kann góðtaka slík úttalilsi, um hetta er út frá einum psykologiskum sjónarmiði. Tað kann vera, at man fær betri mót at gjøgnumføra fullveldið, um vit fáa stórar inntøkur frá oljuni. Hann vil ikki útiloka, at oljuinntøkur kunnu hava eina psykologiska ávirkan á fólk, at tey kanska fara at kenna seg tryggari enn annars í hesi gongdini. Løgmaður leggur tó dent á, at vit skulu ikki grunda fulveldisarbeiðið uppá oljuinntøkur. Tað fer ikki at koma hartil, at man kann siga, at nú avloysa oljuinntøkur blokkin. -Politiskt er tað týdningarmikið at gera sær greitt, at finnur man olju, so skrúvar man harfyri ikki allar slúsur upp.

Løgmaður sigur, at stavnhald okkara á oljuøkinum, og ikki minst hjá teimum, sum hava gjørt fyrireikingarnar til ein oljuútvikling, er at vera varnir og at seta ein oljugrunn á stovn, so vit fáa pengarnar burtur úr umfarinum í Føroyum, so skjótt sum yvirhøvur ber til, soleiðis at ikki alt samfelagið gongur grasad av, at tað nú flóta nógvir pengar inn í samfelagið.

### Vegamót

Løgmaður metir handanina av loyvunum sum eitt týðandi vegamót í allari gongdini á leiðini móti eini oljuvinnu. Nú byrjar hetta at blíva meira konkret og álvara. Anfinn Kallsberg heldur tað eisini vera umráðandi, at føroyskt vinnulív ikki smæðist burtur men nú bjóðar seg fram og tekur avbjóðingina í størsta álvara. Eins og í øðrum vinnum vit luttaka í skal hetta sjálvandi ikki vera ein koddi men nakað, sum vit í kapping við aðrar skulu brúka vitan og royndir til at røkka.



# Avskipa gamalt jarn

*Nøgdin av gomlum jarni, sum flutt verður av landinum er tíggjufaldað, síðan byrjað varð*

EDVARD JOENSEN



**Sund:** Føroyingar eru vorðnir meira at sær komnir, tá hugsað verður um umhvørvið. Í hvussu er, um farast skal eftir nøgdini av gomlum jarni, sent verður av landinum.

Mánadagin lá eitt farmaskip á Sundi og lastaði gamalt jarn frá Kommunalu Orku og Brennistøðini á Sandvíkahjalla.

Kommunala Orku og Brennistøðin sendir regluliga gamal jarn av landinum. Higartil í ár eru farin fýra túsund tons, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini. Hann roknar við, at samlaða nøgdin fer at liggja umleið tey seks túsund tonsini, tá árið er farið.

Hetta er ein tíggjufalding, síðan byrjað varð miðskeiðis í nítiárunum, tá árliga nøgdin var seks hundrað tons, sum avskipað vórðu í bingjum. Tað var skjótt, at tað gjørdist ov trongligt, og teir fóru at leiga smærri farmaskip. Síðan eru skipini vaksin. Í dag lasta skipini eini túsund tons hvørja ferð, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini.

Hann sigur, at alt kemur ikki frá teimum sjálvum kortini. Teir fáa eisini jarnburturkast frá IRF brennistøðini í Leirvík.

Tað er ikki tí, at tað loysir seg fíggjarliga at senda gamalt jarn av landinum, sigur Mikkjal Absalonsen. Prísurin er tengdur at prísinum á heimsmarknaðinum. Og hann er lágur í løtuni. Tað fáast bara einar trýhundrað krónur fyri tonsið í løtuni, meðan teir onkuntíð hava fingið fimmhundrað krónur fyri tonsið.

Men brennistøðin fær eitt ávíst gjald fyri at taka gamlar bilar inn og beina teir burtur. Og tað er hetta gjaldið, sum rindar fyri tænastuna, teir gera føroyska umhvørvinum við at senda øll hesi tonsini av brúktum jarni av landinum.

Merginparturin verður sendur til Skotlands, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini á Sandvíkahjalla. Hann sigur, at skotar gera okkurt smávegis við jarnið, sum síðan fyri tað mesta verður sent til Spania, har tað verður endurnýtt.

# Havnin í oljusamstarv við Stavanger

*Endamálið við samstarvinm er at fremja búskapar- og vinnulívsmenning í báðum býnum í sambandi møguligan oljuídnað í Føroyum*

EYÐUN KLAKSTEIN

**Tórshavn:** Tórshavnar kommuna og Stavanger kommuna fara í næstu viku at skriva undir samstarvsavtalu.

Undirskrivingin fer fram í sambandi við oljustevnuna, sum verður í Stavanger frá týsdegnum til fríggjadagin í næstu viku.

Samstarvsavtalan skal hava við sær búskapar- og vinnulívsmenning í báðum býunum, um veruligur oljuídnaður tekur seg upp í Føroyum.

Býirnir ætla eisini at samstarva um mentan, útbúgving og ítrótt.

### Skriva undir mikudagin

Tað verða borgarstjórarnir í Havn og Stavanger, Leivur Hansen og Leif Johan Sevland, sum fara at skriva undir avtaluna á eini samkomu á ráðhúsinum í Stavanger mikudagin. Til staðar verða eisini Jan Christiansen, Heðin Mortensen og umboð fyri fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna gjørdi í fjør eina líknandi avtalu við Aberdeen, og ætlanin er, at ítøkilig úrslit av hesum samstarvinum skulu á borðið á felagsfundi í Aberdeen í oktober og í Havn í juni næsta ár.

Við avtalunum við Stavanger og Aberdeen hevur Havnini fingið samstarv í lag við báðar teir størstu oljubýirnar í Europa.

### Eisini list

Á oljustevnuni í Stavanger í næstu viku verður eisini eitt mentanartiltak á havnalagnum í norska býnum. Har sleppa samstarvsbýirnir hjá Stavanger at marknaðarføra seg á ymsan hátt.

Bingjulistaverkið hjá Tróndi Patursson fer at standa við síðuna av tjaldinum há Havnini, og Tróndur er eisini boðin við sum luttakari. Hann fer at halda fyrilestur um arbeiði sítt sum listamaður og um ævintýrferðir sínar.

Umframt Havnina fara eisini býir sum Perth í Australia, St. Johns í New Foundlandi og Kristiansund at vísa ymiskt fram undir tiltakinum á havnalagnum




## Flogbóltsfelagið Fleyr
**Box 1022 • 110 Tórshavn**

Venjingartíðir fyri kappingarárið 2000/2001

**Týsdagur – Gundadalshøllin**

| Bani I | Bani II | Bani III |
|---|---|---|
| Kl. 17.00 **D12** | Kl. 17.00 **D16** | Kl. 17.00 **G14** |
| Kl. 18.30 **D14** | Kl. 19.00 **MM** | Kl. 18.30 **MO** |
| Kl. 20.00 **G16** | Kl. 21.00 **MK** | Kl. 20.00 **K1** |
| Kl. 21.30 **1M** | Kl. 23.00 | Kl. 21.30 **MKb** |

**Hósdagur – Gundadalshøllin**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 20.00 **G14** | **MK** | **D14** |
| Kl. 21.30 **D16** | **MM** | **1K** |

**Fríggjadagur – Gundadalshøllin**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 18.00-20.00 **G16** | **MM** | **MK** |

*Byrjað verður 22. august.*

**Fríggjadagur í Eysturskúlanum**

| | |
|---|---|
| Kl. 16.40 **G9** | **D9** |
| Kl. 18.00-19.30 **G12** | **D12** |

*Byrjað verður 1. september.*

*Lýsið í* **sosialinum**